

*Malan Marnersdóttir, forkona í Listafelag Føroya, avmyndað uttanfyri Listasavn Føroya*
*Mynd; Jens Kristian Vang*

# Gróður í føroyskari list

**Listafelag Føroya hevur nærum 70 ár á baki, men í felagnum fegnast tey um, at ongantíð fáast so nógv fólk við list, og ongantíð hevur listaáhugin verið so stórur, sum nú. Á Ólavsøku skipar Listafelag Føroya, sum so mangan, fyri ólavsøkuframsýning**

**Dagfinn Olsen**

Toybil tiðnar, tánar, ornar – bráðnar. Hetta er heitið, sum Listafelag Føroya hevur sett á Ólavsøkuframsýningina 2010.

- Tað sum eyðkennir hesi orð, er at hetta er ein gongd, okkurt hendir. Tað kann vera okkurt, sum broytir skap. Tað kann vera veðurlagið ella sinnið. Ein kann orna um hjartað, ella ein bráðnar við at hugsa um okkurt ella onkran. Men hetta kann eittnú eisini snúgva seg um veðurlagsbroytingar, sum hava verið nógv frammi, sigur Malan Marnersdóttir, forkona í Listafelag Føroya.

## Ymisk tøkni

Malan Marnersdóttir sigur, at nevndin heldur tað vera spennandi at vita, hvat myndlistafólk fáa burturúr hesum.

- Øll snið og øll tøkni og hava áhuga og spennandi er eisini at vita, hvat nevndin velur út og hvat fólka fara at halda um framsýningina, sigur forkonan í Listafelag Føroya.

Eins og í fjør, so er tað nevndin í felagnum, ið velur verkini, ið koma við á sýningina, meðan tað eisini onnur ár hevur verið so, at nevndin hevur heitt á fólk um at taka sær av sýningini.

## Gamalt og stórt felag

Listafelag Føroya er gamalt felag. Føroyskir studentar og útisetar settu felagið á stovn í Keypmannahavn í 1941 við tí endamáli at stuðla myndlistini. Tá seinna heimskríggj endaði í 1945, var aftur samband millum Danmark og Føroyar, og listafólkini fluttu heim til Føroya, og somuleiðis Listafelagið.

Fyrsta Ólavsøkuframsýningin var í 1948, og síðani 1950 hevur hon verið fast hvørt ár. Nevnast kann eisini, at í 1955 varð skipað fyri stórari ferðaframsýning við føroyskari list, ið var í Danmark og Noreg.

Í byrjanini varð list víst fram í bankunum ella í Kommunuskúlanum í Havn. Listafelag Føroya arbeiddi fyri at fáa listasavn og í 1970 lat Listaskálin, gamli partur, upp. Hetta er nú 40 ár síðani.

Listafelagið rak Listaskálan. William Heinesen var formaður og Janus Kamban dagligur leiðari, og seinni Bárður Jákupsson.

Listafelagið gekk undan og arbeiddi fyri at fáa ein almennan stovn. Í 1989 vórðu almenna listasavnið, listasavnið hjá Listafelagnum og Listaskálin samskipað í Listasavn Føroya.

- Endamálið hjá Listafelagnum er at vísa list og at selja list. Felagið keypir list og letur eisini stuðul til eittnú framsýningar ella útgávur ella talan kann vera um ferðastuðul. Skipað verður eisini fyri ymsum fyri limunum, t.d. limakvøldum ella ferðum, har listafólk fáa vitjan og limirnir síggja list. Long siðvenja er fyri hesum í felagnum, ið hevur yvir 600 limir, sigur Malan Marnersdóttir.

## Stórur listaáhugi

Malan Marnersdóttir sigur, at tað er hugaligt, at áhugin fyri myndlist er so stórur og at ymisk tøkni verður nýtt.

- Fólk skriva sangir ella yrkja og geva út. Og arkitektar hava vakt ans fyri, at hús og almennir bygningar gerast vakrari nú, enn fyrr. Og myndlistin er eisini við nú, og tað er sera spennandi at eygleiða, hvussu fólk blanda ymsu miðlarnar og ta tøkni, sum er tøk í dag, sigur Malan Marnersdóttir.

- Tað hava ongantíð verið so nógv fólk, sum nú, ið fáast við list á ymsum stigum. Tað er onki niðrandi í at sita við køksborðið ella í kjallaranum ella aðrastaðni. Hjá summum stendst verulig list burturúr, uttan mun til, um gingið hevur verið nógv ella lítið til frálæru, sigur Malan Marnersdóttir.

- Listafelagið er fyrst og fremst áhugað í list og frøist um list og um, at tað er gróður í føroyskari list, sigur Malan Marnersdóttir, forkona í Listafelag Føroya.

**Fakta**

Ólavsøkuframsýningin letur upp ólavsøkuaftan klokkan 14:00 og hongur uppi til 8. august 2010.